# Løgreglan stúrdi fyri at tað skuldi bresta saman

**– Løgreglan lurtaði ikki eftir telefonunum hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag í verkfallinum í fjør, sigur M. Nepper-Christensen, fúti**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



Tað var ótti fyri bardaga ímillum blokaduvaktir og fólk, sum vórðu tarnað í ferðsluni, sum fekk løgregluna at leggja uppí verkfallið hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag í fjør.

Hetta stendur í eini frágreiðing, sum M. Nepper-Christensen, fúti, hevur skrivað um framferðina hjá løgregluni í sambandi við verkfalli.

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag hava verið so ónøgd við framferðina hjá løgregluni, at tey klagaðu hana fyri fútanum.

Men fútin heldur ikki, at nakað var at finnast at og tí hevur hann víst kæruni frá sær.

Men fakfeløgini góvust ikki so tí tí hava tey klagað løgregluna fyri sjálvum løgmálaráðnum ogt har liggur málið í løtuni.

– Løgmálaráðið hevur biðið okkum um eina viðmerking til kæruna og tað fara vit skjótt at avgreiða, sigur fútin í eini viðmerking.

### Vandi fyri samanbrestum

Men í frágreiðingini hann skrivaði um kæruna frá fakfeløgunum heldur hann ikki, at nakað er at finnast at viðvíkjandi framferðini hjá løgregluni.

– Á fleiri støðum vóru nógvar blokaduvaktir, sum tarnaðu ferðsluni, og tey ferðandi vórðu rannsakað og vóru eisini fyri aðrari ósømiligari viðferð og sostatt varð ferðslan órógvað.

– Nógv fólk vóru uppøst um framferðina hjá blokaduvaktununum og tí var stórur vandi fyri beinleiðis samanbrestum ímillum ferðandi og blokaduvaktir.

– Tí legði løgreglan upp í, sigur fútin.

Men orðið fútaforboð varð ikki brúkt. Og hann heldur, at tað var neyðugt hjá løgregluni at leggja upp í fyri at halda lóg og landaskil.

Hann sigur, at tað er ikki loyvt at forða ferðsluni, ella at órógva onnur, t.d. við at hópa seg saman og tí hevði løgrelgan eisini heimild til at leggja uppí, leggur hann afturat.

Hann sigur, at løgreglan gav fakfeløgunum eina freist uppá 15 minuttir at fáa blokadurnar av vegunum, hóast løgreglan ikki hevði skyldu til at geva teimum nakra freist yvirhøvur.

– Tá ið løgreglan staðfestir, at nógv telefonsamband var ímillum skrivstovurnar og blokaduvaktirnar, heldur hann, at freistin var rímilig.

### Lurtaðu ikki

Men hann leggur dent á, at løgreglan lurtaði ikki eftir telefonunum hjá feløgunum í loyndum.

– Tá ið fakfeløgini høvdu fingið freistina upp á 15 minuttir, kundi rættiliga skjótt staðfestast at blokadurnar vórðu ferð við at verða tiknar av, eins og blokaduvaktirnar søgdu, at tey longu høvdu fingið boð um, at tær skuldu halda uppat. Tí kundi løgreglan staðfesta, at nógv telefonsamband var ímillum skrivstovurnar og blokaduvaktirnar.

Annars harmast fútin um, at leiðslurnar í Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag hava følt seg forfylgd av løgregluni, men hann tað er ikki hansara fatan, at tað var so.

– Uppgávan hjá løgregluni var at fáa blokadurnar at halda uppat og at tryggja, at tær ikki vórðu tiknar uppaftur, sigur M. Nepper-Christensen.

Annars sigur hann, at tað stendur í lógini, at fólk, ið ikki eru skuldsett, skulu avhoyrast hvørt sær. Vitni kunnu ikki lurta eftir frágreiðingunum hjá øðrum vitnum. Sostatt kundu nevndin í Havnar Arbeiðskvinnufelag ikki sleppa við, tá ið forkvinnan av til avhoyringar, tí tað kundi ikki útihýsast, at eisini aðrir nevnarlimir skuldu avhoyrast, sigur fútin.

# Ikki menninir men kvinnurnar

Í greinini í blaðnum leygardagin, vóru vit so óskettin at skriva, at tað er Havnar Arbeiðsmannafelag, sum hevur klagað løgregluna fyri lógmálaráðnum, saman við Føroya Arbeiðarafelag.

Men leasarin minnist, at tað var ikki Havnar Arbeiðsmannafelag, sum var í verkfalli, men Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðarafelag og tað eru sjálvsagt tey bæði feløgini sum hava klagað og Havnar Arbeiðsmannafelag er á ongan hátt partur í málinum

Í klaguni nevna fakfeløgini fleiri ítøkilig dømi um framferð hjá løgregluni, sum tey ikki vilja góðtaka.

– Eitt nú boðaði løgreglan frá hon kom við fútabanni ímóti blokadunum. Men eitt fútabann hevur onki við løgregluna at gera. Eitt fútabann er ein avgerð, sum einans kann takast av dómsvaldinum, sigur IngeborgVinther.

Hon fýlist eisini á, at løgreglan einans vildi geva fekfeløgunum 15 minuttir at taka blokadurnar kring landið av.

– Hetta er alt ov stutt skotbrá, tí Løgreglan veit, at vit hava ongan møguleika at taka allar blokadurnar kring landið av við so stuttari freist, sigur Ingeborg Vinther.

– Men so hava vit eisini lagt merki til, at løgreglan í sínum viðmerkingum til málið hevur sagt, at eitt korter var ríkiligt, tí tað var nógv telefonsamband ímillum skrivstovurnar í Havnini og blokaduvaktirnar. Vit hava spurt okkum sjálvi, um løgreglan í loyndum hevur lurtað eftir telefonini hjá okkum, tí hvussu kann hon annars vita, hvussu telefonsamskiftið er ímillum skrivstovurnar hjá okkum og blokaduvaktirnar, spyr Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tey føldu seg eisini rættiliga forfylgd av løgregluni hesa tíðina, verkfallið vardi.

– Tað kom ofta fyri, at løgreglufólk tarnaðu okkum í vanligari ferðslu. Tað gjørdu teir ofta við at koyra aftaná okkum og forfylgja okkum, ikki bara í blokaduøkjum, men eisini í vanligari ferðslu.

Tey klaga eisini um, at øll nevndin í Havnar Arbeiðskvinnufelag ikki sluppu at vera hjástødd, tá ið løgreglan avhoyrdu forkvinnuna.

# Vit fáa onki gjørt við álopið á fólkafloksmenn

**– Anfinn Kallsberg kann ikki krevja at tjóðveldisflokkurin skal standa til svars fyri álopið frá Tórbirni Jacobsen, sigur Heini O. Heinesen, næstformaður í tjóðveldisflokkinum**

SAMGONGUSAMSTARV
*Áki Bertholdsen*

– Hatta má standa fyri hansara egnu rokning

Heini O. Heinesen, næstformaður í Tjóðveldisflokkinum, sigur, at Tórbjørn Jacobsen má sjálvur standa til svars fyri tey álop, hann hevur gjørt á løgmann og Jørgen Niclasen, landsstýrismann í fiskivinnumálum.

Í blaðgrein herfyri helt Tórbjørn Jacobsen fyri, at bæði løgmaður og fiskimálaráðharrin høvdu so ivasama fortíð, har tað var ringt at skilja ímillum teirra egna og annara, at tað var ringt at sita í samgongu við teimum.

Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins, hevur sagt, at hetta er eitt persónsmál og tað fer hann ikki at gera viðmerkingar til.

Heini O. Heinesen, næstformaður tjóðveldisfloksins, er samdur í at hetta er eitt persónsmál, men hann hevur onki ímóti at siga sína meining.

Hann leggur tó dent á, at hetta er hansara egna meinig og at hann ikki tosar vegna tingmanningina, tí hon hevur ikki viðgjørt málið.

Men hann dugir heldur ikki at síggja, at hetta er eitt mál fyri flokkin yvirhøvur.

– Tað, sum Tórbjørn Jacobsen hevur skrivað má standa fyri hansara egnu rokning og tað veit hann ivaleyst av sjálvur. Tað er ikki flokkurin, sum hevur sett skuldsetingar fram og tað er ikki flokkurin, sum stendur aftanfyri tær. Tað er ein einstakur tingmaður og tað má tann einstaki tingmaðurin eisini taka ábyrgdina av.

Og tí hevur Heini O. Heinesen heldur onga viðmerking til sjálvar skuldsetingarnar.

### Eitt persónsmál

Heini O. Heinesen sigur, hann er eisini sannførdur um, at Løgmaður ikki fer at krevja, at tjóðveldisflokkurin skal standa til svars fyri tað, sum hvør einstakur tingmaður sigur.

– Hvør tingmaður sær stendur sjálvur til svars fyri tað, hann sigur ella skrivar. Tað kann flokkurin ikki ábyrgjast fyri og soleiðis er tað í øllum flokkum, sigur hann.

Hann sigur, at tí er talan ikki um eitt politiskt mál men um eitt persónsmál sum teir tríggir, Tórbjørn Jacobsen, Anfinn Kallsberg og Jørgen Niclasen, sjálvir mugu greiða sínamillum.

– Tað vildi eisini verið nakað nógv av Løgmanni at kravt av tjóðveldisflokkinum, at vit skuldu tikið støðu til skuldsetingarnar frá Tórbirni Jacobsen.

– Tað er á ein hátt tað sama sum at krevja at tjóðveldisflokkurin skal geva løgmanni tað bláa stemplið fyri hansara fortíð og tað verður trupult at krevja, tí tað tilkemur ikki okkum- uttan at tað skal leggjast nakað serstakt í tað- sigur Heini O. Heinesen.

– Tí stendur tað til løgmann og Jørgen Niclasen sjálvar at gera av, hvussu teir verja seg, um teir fara rættarinnar veg, ella hvat. Tað er ongin orsøki at blanda aðrar politikarar ella heilar flokkar upp í.

Heini O Heinesen vísir eisini á, at tað finnast nógv fordømi í føroyskum politikki, sum kunnu samanberast við tað, sum nú er hent, ikki minst í fólkaflokkinum sjálvum, uttan at tað hevur fingið politiskar avleiðingar.

– Øll minnast skrivingar- og tosingarlagið hjá Óla Breckmann og, hvussu grovur hann kann vera.

– Men í eini 25-30 ár hevur fólkaflokkurin púra avgjørdur nokað at tikið ábyrgdina av tí, sum Óli Breckmann hevur sagt og skrivað. Tvørturímóti hevur flokkurin ferð eftir ferð ført fram, at “hatta er bara Óli” og tað kann flokkurin ikki standa til svars fyri - og tað hava hinir flokkarnir góðtikið øll árini og øðrvísi kann tað ikki vera nú.

### Hava góðtikið løgmann

Heini O.Heinesen vísir annars á, at tað fer eisini at bera illa til hjá tjóðveldisflokkinum at finnast at løgmanni og Jørgen Niclasen fyri nakað, sum liggur afturi í tíðini.

– Vit hava samstarvað politiskt í gott fýra ár nú. Vit valdu Anfinn Kallsberg til Løgmann og Jørgen Niclasen til landsstýrismann fyri fýra árum síðani og vit hava akkurát valt teir einaferð afturat nú.

– Tí kann tað tykjast eitt sindur øvugt at føra so harðar skuldsetingar fram nú, heldur næstformaðurin í tjóðveldisflokkinum.

– Var nakað at vera misnøgdur um, skuldu vit havt gjørt vart við tað fyrr, leggur hann afturat.

Hann leggur afturat, at hann heldur, at tað er ivingarsamt, hvussu fremjandi tað er fyri politiska samstarvið at føra skuldsetingar sum hesar, fram.



# I AM til Noregs at spæla

**Føroyski gospelbólkurin skal vera høvuðsnavn á norska Køre-festivalinum. Fyrireikararnir hava lagt nógv fyri í royndini at fáa I AM til Noregs at spæla**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



*I AM skal vera høvuðsnavn á norskum gospelfestivali fyrst í august mánaði*

Fyrst í august mánaði fer I AM til Noregs at spæla á einum gospelfestivali. Talan er um Køre-festivalin, og føroyski bólkurin skal spæla á høvuðspallinum leygarkvøldið á festivalinum.

I AM spældi í fjør á einum øðrum gospelfestivali í Noregi, og har gjørdu teir vart við seg. Teir høvdu tríggjar framførslur, og tann seinasta framførslan bleiv flutt, so fleiri fólk kundi hoyra føroyska gospelbólkin.

Tað var eisini á hesum festivali, at fólk frá Køre-festivalinum hoyrdu I AM.

Síðani hava tey verið í sambandi við Adore Music, sum umboðar I AM uttanlands, og norðmenn hava lagt nógv fyri í royndini at fáa I AM til Noregs at spæla.

Tað hevur eisini eydnast teimum, og fyrst í komandi mánaði fer I AM avstað til Noregs.

I AM skal spæla í 1 tíma og 20 minuttir, og teir eru høvuðsnavn á festivalium, sum sigst vera væl fyriskipaður.

I AM skifti herfyri gittarspælara, eftir at Mikkjal Hvannastein tók seg úr bólkinum, og hetta verður tí fyrsta stóra uppgávan hjá I AM, síðani Arni Zachiarsen kom við í bólkin.

# 200 eisini við á Ólavsøkukonsertini

**Nú verður eisini punkrockur at hoyra á Ólavsøkukonsertini. 200 er eisini boðsent at vera við**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Ein bólkur afturat verður við á Ólavsøkukonsertini 27. juli, og tað er punkrockbólkurin 200. Talið á bólkum til stóru konsertina kemur tí upp á 10.

200 gjørdi vart við seg í Prix Føroyar kappingini í fjør, og teir góvu út fløguna 200% stutt fyri jól í fjør.

Síðani hevur bólkurin havt onkrar framførslur, og á ólavsøku verða teir aftur at hoyra á føroyskum palli.



*200 skal spæla á ólavsøkukonsertini*

# Teitur spælir í Gøtu

POP.FO

Sunnukvøldið fer Teitur Lassen at hava konsert í Gøtu í sambandi við útgávuna av nýggju fløguni hjá sær

Í næstum kemur Teitur Lassen út við nýggjari fløgu, sum hann kallar Sólin og regnið. Talan er um eina fløgu við føroyskum yrkingum.

Í sambandi við hesa útgávu fer Teitur at spæla í Gøtu sunnukvøldið. Konsertin verður í Losjuni, og umframt Teit fara eisini Blues Valentin Trio og H.O.P at spæla.



# Óheppið orðaspæl

**Tíðindaskrivið, sum Restorff´s Bryggjarí sendi fjølmiðlunum í seinastu viku, um at nýggja øl teirra "Mungát" er gott fyri sinnið, metir felagið Sinnisbati verða villleiðandi fyri sinnisveik- og sjúk**

*Ingrid Bjarnastein*



*Svenning av Lofti, formaður í Sinnisbata, ger vart við, at bryggjarí og fjølmiðlar eiga at ansa eftir, hvussu tey ymisku tíðindaskrivini verða orðað, av tí at hetta kann raka sinnisveik- og sjúk*

– Vit halda, at vit eru gingin ov nær í hesum føri, sigur Svenning av Lofti, formaður í Sinnisbata.

– Henda orðingin kann verða misskilt av teimum fólkunum, sum vit umboða, serliga tá tað stendur beinleiðis í tíðindaskrivinum, at ølið er gott fyri sinnið.

Svenning av Lofti vísir á, at tey, ið hava veikleikar fyri rúsandi løgum, taka heilivág, og tá øl verður beinleiðis lýst til at vera gott fyri sinnið, so verður hetta mett, sum eitt slag av heiligvági.

– Tíðindaskrivið er orðaspæl, tað eru vit væl varug við, men hetta er óheppið, og vit meta hetta at fara út um mark. Tí vilja vit bara gera vart við okkum uppá ein hampuligan máta á teimum røttu støðunum, sigur Svenning av Lofti.

Formaðurin í Sinnisbata heldur, at hetta er ikki nóg væl umhugsað av teimum, sum hava skrivað tað, men tað er avgjørt ikki tilvitað.

– Vit vilja ikki blanda okkum uppí lýsingar og tíðindaskriv sum heild, men av tí, at vit meta, at hetta rakar bólkin, sum vit umboða, so eiga vit, at fortelja, at hetta kann gerast skaðiligt fyri fólk, ið eru sinnisveik.

Svenning av Lofti vil tí við hesum mótmælinum heita á bæði fjølmiðlar og bryggjarí um at verða meira varin næstu ferð, og eisini hugsa um, hvussu skrivað verður.

Mótmælið er at lesa aðrastaðni í blaðnum.


GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Micra 1,0 GX**
gráur, 5 hurðar,
árg. 1999, 27.000 km.
**85.000**

**Nissan Micra 1,0**
grønur, 3 hurðar,
árg. 2000, 27.000 km.
**88.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1997, 110.000 km.
**110.000**

**Nissan Almera 1,6**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1996, 66.000 km.
**75.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1998, 119.000 km.
**110.000**

**Nissan Sunny 1,6 LX**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1987.
**15.000**

**Nissan Primera 2,0 SLX**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1997, 45.000 km.
**105.000**

**Peugeot 306 DT 1,9**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1997, 150.000 km.
**90.000**

**Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1994, 230.000 km.
**120.000**

**Opel Corsa 1,2**
grønur, 3 hurðar,
árg. 1996, 40.000 km.
**65.000**

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
**67.000**

**Opel Vectra 1,4**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1990, 255.000 km.
**26.000**

**Opel Vectra 2,0 Di**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1998, 96.000 km.
**130.000**

**Subaru 1600**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1989, 140.000 km.
**10.000**

**Saab 900 2,0i**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1996, 129.000 km.
**110.000**

**Mazda 323 Aut.**
beige, 4 hurðar,
árg. 1997, 108.000 km.
**65.000**

**Fiat Tipo**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1990, 196.000 km.
**10.000**

**Honda Civic 1,4is**
grønur, 3 hurðar,
árg. 1998, 101.000 km.
**99.000**

**Volvo S40 1,8**
reyður, 4 hurðar,
árg. 2002, 12.000 km.
**250.000**

**Chevrolet Monza**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1988, 98.000 km.
**7.000**

**Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin